## Fáa íleggjarar

Borgarstjórin í Fuglafirði, Sigurð Simonsen, væntar ikki, at partafelagið, sum skal gera tann ætlaða tunnilin millum Kambsdal og Skálabotn, fer at fáa trupulleikar við at fáa íleggjarar at fíggja verkætlanina. Tunnilin, sum kommunan ætlar at gera, verður 2300 metrar langur og er mettur at kosta 100 mió. krónur umframt vegir til teir báðar munnarnar. Í síðstu viku bað kommunan vinumálaráðið um loyvi til at gera tunnilin.

## Byggja út

Tey, sum eiga Hotel Streym, hava søkt Tórshavnar kommunu um loyvi til at byggja hotellið út. Hotellið, sum byrjaði sítt virksemi í fjør, hevur sum er 14 kømur. Men tað hevur víst seg at vera ov lítið, og tí er ætlanin at byggja uppí. Nýggi bygningurin verður átta ferðir tólv metrar í trimum hæddum. Tann niðasta hæddin verður til parkering, og í hinum báðum koma tólv kømur afturat. Útbyggingin er mett at fara at kosta fýra mió. krónur.

*(Kelda: www.dimma.fo)*

# Felagið fyri Kirkjuráðslimir á kunningarferð

**Í samband við yvirtøku av fólkakirkjuni og harvið smíð av nýggjum lógum, er Felagið fyri Kirkjuráðslimir á kunningarferð saman við Bergi Berg frá Mentamálaráðnum**

KIRKJA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Tummas Lauritsen, formaður í Felagnum fyri Kirkjuráðslimir, og Bergur Berg, Mentamálaráðið, byrjaðu sunnudagin eina kunningarferð kring landið, har ætlanin er at kunna kirkjuráðslimir um lógarsmíð í samband við yvirtøkuna av fólkakirkjuni og geva teimum møguleika at spyrja og gera viðmerkingar.

Tummas Lauritsen og Bergur Berg høvdu fyrsta fundin sunnudagin umborð á Smyrli, meðan skipið lá við bryggju á Krambatanga. Kirkjuráðslimir úr Suðuroynni lýddu áhugaðir á, meðan Bergur Berg greiddi frá og aftaná var møguleiki at gera viðmerkingar og seta spurningar. Bergur Berg kunnaði eisini um møguleikan at gera viðmerkingar á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum.

Tummas Lauritsen sigur, at ymiskt var, ið kirkjuráðslimirnir høvdu hug at gera viðmerkingar til.

- Eittnú er galdandi í Danmark og í galdandi lógum hjá okkum, at møguleiki er at gera sonevnd valkirkjulið. T.d. er Torben Johannesen prestur í einum slíkum í Danmark. Okkara kirkjulið eru vanliga landafrøðilig, soleiðis at skilja, at ein er við har, ið ein býr. Men møguleikin við valkirkjuliðum dettur burtur í nýggju lógunum, men talan er nú um at fáa hetta inn aftur í lógina, sigur Tummas Lauritsen.

- Hetta førir so eisini við sær, at aðrir møguleikar mugu vera viðvíkjandi kirkjuskatti. Ein má kunna "taka hann við sær", har ein velur fara í eitt kirkjulið, nevnir Tummas Lauritsen, sum annars fegnast um, at eini 22 limir møttu á fundi, hóast ivasom koyrilíkinidi og hann metir eisini, at Smyril hóskar sum fundarstaður.

Fundurin á Smyrli var hin fyrsti í røðini. Kunnadi ferðin heldur fram og mánadagin 22/1-07 er fundur í Klaksvík í kjallaranum í Christianskirkjuni. Mikudagin 24/1-07 er fundur í Hvalvík í Missiónshúsinum. Leygardagin 27/1-07 verður fundir í Sandavági í Meinigheitshúsinum, mikudagin 31/01-07 verður fundur í kjallaranum í kirkjuni í Gøtu, mikudagin 07/02.07 í Argja kirkju og fríggjadagin 09/02-07 í Skopun í Ungmannafelagshúsinum.

Allir fundirnir eru klokkan 19:30.

## Hálkan órógvaði løgregluna

**Vikuskiftið hjá løgregluni hevur verið ógvuliga friðarligt, og verður sæð burtur frá nøkrum hálku óhappum, so hevur verið millum lítið og onki at gjørt hjá teimum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Aftur hesaferð var talan um eitt friðarligt vikuskifti hjá løgregluni.

– Her hevur verið øgiliga friðarligt. Vit hava havt nøkur hálku óhapp, tí nakað av kava hava vit havt, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í morgun.

Talan hevur verið um smá óhapp kring alt landið, tíbetur uttan at stórvegis skaði stóðst av tí nakrastaðni.

Í mun til náttarlívið, sum ofta hevur verið nakað harðligt, var eisini lítið at gera hjá løgregluni. Fólk skikkaðu sær pent og ongin harðskapsmál vóru.

– Okkurt smávegis herverk var tó, og onkrir fullir menn vórðu tiknir upp, men annars onki óvanligt, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í morgun.

# Poul F. avdúkaður

**Fríggjakvøldið varð bringumynd av skaldinum Poul F. Joensen avdúkað á samkomu í skúlanum í Sumba**



Tað er italiumaðurin Giovanni Francesco Nonne, ið hevur evnað bringumyndina til úr gipsi. Arnfinnur Bjarkhamar tók stig til at keypa og fáa myndina til Sumbiar, har hon skal standa á bókasavninum í skúlanum.

Poul F. vaks upp í Sumba, men sítt vaksna lív búði hann í Froðba, tó hann ongantíð segði seg gloyma heimbygdina.

Á samkomuni savnaðust nógv fólk og tað var sonur Poul F, Johannus Joensen, ið tók dúkin av bringumyndini.

Trygvi Thomsen og Danjal Johan Lisberg hugleiddu um skaldið og Hanus G. Johansen sang løg, ið hann hevur sett til yrkingar hjá Poul F.

Sumbingar og tey samankomnu kvóðu sínaði tvey kvæði, ið Poul yrkti, og síðani var kaffi á skránni.